

*Tað sigst, at Finnbogi Ísakson var orsøkin til ta ótraditionellu samgonguna millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin í 1975*

Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður:

# Tordi at ganga nýggjar og óroyndar leiðir

FINNBOGI FARIN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Vit báðir hava kenst frá barnsbeini. Foreldur okkara búði í somu gøtu, Víkavegnum, og tað var bara eitt hálvt ár millum okkum, sigur Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, í eini viðmerking, nú Finnbogi Ísakson er deyður.

Finnbogi var hálvt ár yngri enn Vilhelm, so teir hava ikki gingið í flokki saman í skúlanum.

– Men vit høvdu nógv saman sum smádreingir. Eitt nú spældu vit fótbólt saman. Hvør býlingur í Klaksvík hevði sítt fótbóltslið, greiðir Vilhelm frá.

Teir báðir komu at kennast rættuliga væl seinni. Finnbogi fór ungur til Havnar á studentaskúla. Hann var uppstillarður - og valdur á ting í 1966.

Vilhelm var fyrstu ferð uppstillaður í 1970, og teir báðir høvdu mangar politiskar dystir á valfundum í Norðoyggjum, sum framvegis verða havdir á munni. Í 1980 vóru teir báðir valdir á ting fyri Norðoya valdømi - og komu teir tá at samstarva rættuliga nógv, bæði sum tingmenn og sum samgongufelagar.

Upp gjøgnum sjeytiárini høvdu teir báðir eisini nógv samstarv. Vilhelm Johannesen var blaðstjóri á Sosialinum, meðan Finnbogi var blaðstjóri á Tíðindablaðnum.

– Tað var Finnbogi Ísakson, sum ruddi slóð fyri ótraditionellu samgonguni eftir løgtingsvalið í 1974, sum endaði við, at Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin skipaðu samgongu í januar í 1975, sigur Vilhelm Johannesen.

– Tá kom Finnbogi til mín eitt kvøldið og bað meg koma niðan at vitja Atla Dam. Tað sum spurdist burtur úr hesi vitjan var samstarvið millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin - hetta var óroynt, óhoyrt og eingin hevði droymt um slíka samgonu, men her vísti Finnbogi Ísakson, at hann tordi at ganga nýggjar og óroyndar leiðir í politikki.

Vilhelm Johannesen sigur, at hetta var ein sera virkin samgonga. Samstarvið og politiska gongulagið var sera gott árini 1974-1978, og nógv stórmál vóru á skránni, eitt nú keypið av nýggja Smyrli og yvirtøkan av Postverkinum, har Finnbogi setti tveir virðiligar varðar eftirs eg, heldur Vilhelm Johannesen.

Vilhelm sigur, at Finnbogi var ein ótrúliga gløggur politikari. Hann gjørdi nógv fyri løgtingið sum stovn. Slóðaði fyri at byggja nýtt løgtingshús, men tá meiriluti ikki fekst fyri tí, fekk hann gongd á umbyggingina av løgtingshúsinum og telefonverksbygninginum, har tvey tey fyrstu byggistigini eru liðug, meðan tað triðja bíðar eftir, at Føroya Tele flytir út úr bygninginum á Tinghúsvegnum.

- Nógv er mist við Finnboga Ísakson. Men sjálvandi er missurin størstur hjá Ásu og næstringunum, sigur Vilhelm Johannesen.

---

†

Týskvøldið 30. august andaðist elskaða kona, mamma, omma og langomma okkara

**Sigrid Petrine Andreasen**

65 ára gomul.

Jarðarferðin verur úr Akranes kirkju fríggjadagin 9. september kl. 16.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Brandur**
**Ingun v/ familju, Johannes v/ familju og Signar**

*Tey, ið vilja minnast Sigrid, kunnu lata eina peningagávu til konto 9181 4264632 í Føroya Sparikassa*

---

# Tøkk

Øllum tykkum mongu, sum á ymiskan hátt gleddu meg og gjørdu 70 ára dagin 19. august so hugnaligan, takki eg hjartaliga.

**Bestu heilsur**
**Brynjólvur Petersen**

---

Jógvan Sundstein:

## – Finnbogi var álitismaður

**– Eg minnist Finnboga sum ein dugnaligan politikara. Hann var álitismaður, og hóast vit ikki altíð vóru samdir um alt, so bar tað altíð til at tosa við hann um tingini. Hann var góður at samstarva við, sigur Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgmaður**

FINNBOGI FARIN
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Eg bleiv skakkur, tá ið eg fekk tíðindini í morgun um, at Finnbogi var farin. Hann fór á alt ov ungum aldri, og eg vil siga mína samkenslu til Ásu og familjuna, sigur Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgmaður.

– Eg og Finnbogi hava arbeitt nógv saman í politikki. Eg kom í løgtingið í 1970, og hann var komin inn fýra ár frammanundan. Vit arbeiddu saman í tinginum, og í 1975 vóru vit við til at skipa nýtt landsstýri, sum var nýskapandi í føroyskum politikki.

– Eg minnist Finnboga sum ein dugnaligan politikara. Hann var álitismaður, og hóast vit ikki altíð vóru samdir um alt, so bar tað altíð til at tosa við hann um tingini. Hann var góður at samstarva við.

– Eg hava bara gott at bera honum, og tíverri er hann farin alt ov ungur, sigur Jógvan Sundstein.

---

## Slóðbrótandi fjølmiðlamaður

**– Finnbogi hevði dirvi at gera tingini øðrvísi, og í Sjónvarpinum var hann ein drívmegi at skapa tað nýggja. Hann kom við hugskotum og setti tey í gongd, sigur Jógvan Jespersen, stjóri fyri Kringvarpið**

FINNBOGI FARIN
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Jógvan Jespersen, stjóri fyri Kringvarp Føroya, hevur havt nógv samstarv við Finnboga Ísakson í fjølmiðlasamanhangi.

– Eg lærdi Finnboga at kenna, tá ið eg síðst í 70'unum kom í Útvarpið at arbeiða, og eg kom av álvara at kenna hann í 1984, tá ið vit báðir vóru við til at byrja føroyska Sjónvarpið. Tað var sum ein familja í Sjónvarpinum, og tað vinarlagið, sum vit fingu har, hevur vart síðani, sigur Jógvan Jespersen.

– Bæði politiskt og í øðrum viðurskiftum eyðkendi tað Finnboga, at hann var ótrúliga góður til at síggja samanhangin í tingunum. Hann var vitugur, og hann dugdi væl at analysera.

– Málsliga var hann eisini sera væl fyri, og hann hevði ógvuliga góð evni at úttrykkja seg bæði á skrift og í talu. Hann var sera greiður, og hann fekk altíð sín boðskap fram.

– Finnbogi hevði dirvi at gera tingini øðrvísi, og í Sjónvarpinum var hann ein drívmegi at skapa tað nýggja. Hann kom við hugskotum og setti tey í gongd.

– Finnbogi kom at starvast í Útvarpinum í 60'unum, og hann hevur líka síðani havt tætt tilknýti til Útvarpið og verið ein hollur vinur hjá Útvarpinum, sigur Jógvan Jespersen.